


Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Tvey nýggj leitiloyvir til Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

21.01.2015 - 09:01

Oljan.fo

Norska oljumálaráðið hevur latið tvey loyvir til eitt samtak sum Atlantic Petroleum er við í. Við hesum hevur Atlantic petroleum nú tíggju leitiloyvir í norskum sjógvi.

- Tað er hugaligt at kunna almannakunngera at vit hava fingið part í tveimum nýggjum leitiloyvum í norskum sjógvi, sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum.

- Serstakliga er tað áhugavert at vit nú eru komin inn á Haltenbank-leiðina, ið er eitt øki har olja er funnin, umframt at har eru fleiri áhugaverdar ætlanir, sigur hann.

Atlantic Petroleum sigur í eini kunning til keypsskálarnar at bæði loyvini sum AP hevur fingið í hesum umfarinum liggja nærhendis brunnum har kolvetni er ávíst.

Hesi bæði loyvini eru eisini ein hornasteinur í søgu felagsins, tí felagið aftaná bert tvey ár á norska landgrunninum, er við í tíggju loyvum.

Tað fyrra loyvið, ið liggur á Haltenbankanum í norska partinum av Norðhavinum, er tað Statoil sum er fyristøðufelag fyri. Hetta loyvi krevur at borast skal áðrenn fýra ár eru farin frá loyvið er givið.Samstarvsfeløgini hava býtt hetta loyvið soleiðis millum sín: Statoil (fyristøðufelag) 40 prosent, Atlantic Petroleum Norge AS 20 prosent, Core Energy 20 prosent og Edison International Norge Branch 20 prosent.

Hitt loyvið liggur í Vøringsbrunninum, og kallast ganske, ið eisini liggur í norska partinum av Norðhavinum. Her skulu feløgini innan tvey ár taka avgerð um borast skal, og boringin skal vera farin í gongd áðrenn fýra ár eru gingin frá loyvið er givið. Samstarvsfeløgini í hesum loyvinum eru: Repsol (fyristøðufelag) 40 prosent, Atlantic Petroleum Norge AS 20 prosent, Eon E & P Norge 20 prosent og OMV Norge AS 20 prosent.